


# Framtíðar sjóvinnu-Føroyar: bæði tænastu- og menningardepil

**Jan Müller**

30.05.2015 - 16:31

Oljan.fo

”Føroyar eru tað landið í Europa, sum enn hevur flestar vinnuligar møguleikar eftir at troyta. Bera vit okkum rætt at, kunnu vit venda tað til okkara fyrimuns, at vit ikki enn hava ment okkara kjarnuvinnur til fulnar.”

Hetta var ein av boðskapunum hjá Tróndi Djurhuus, íverksetara, stjóra og og rithøvunda, tá hann helt fyrilestur á Atlantic Fair í Klaksvík undir heitinum ”Mitt í maritima Mekka – føroyskur sjómansskapur sum grund undir nýggjum vinnum”.

Hann legði dent á, at Føroyar eftir hansara tykki serliga eiga at grunda vinnumenningina á tað, sum er størsta strategiska styrkin hjá føroyingum, nevniliga sjómansskapin. Við støði í m.a. teirri skjótu og munandi menningini av frálandsvinnuni og tænastunum til hana, vísti hann á, hvussu munadyggar tænastuvinnur kunnu spyrjast burtur úr góðum sjómansskapi.

Tróndur Djurhuus hevur eisini í fleiri ár verið við í verkætlanum, sum fevna um menning av nýggjum tøknum og loysnum við støði í føroyska sjómansskapinum, og hann er sjálvur við í fyritøkum, sum eru sprotnar úr tí. Í hesum høpi hevur hann samstarvað og samráðst við bæði almennar stovnar og vinnulív í fleiri londum og í fleiri heimspørtum, herundir í Beijing.

Niðurstøðan er, at føroyskur sjómansskapur selur seg sjálvan í nógvum londum – bæði sum hugtak og sum eitt hugsað grundarlag undir menning av loysnum og tøknum.

Í fyrilestri sínum mælti Tróndur tí til, at føroyingar í staðin fyri at síggja ymisk maritim vinnulig átøk isolerað, fara at arbeiða við strategisku møguleikunum fyri at gera Føroyar til tveir vinnuligar maritimar deplar – ein tænastudepil og ein menningardepil.

Hann segði í hesum sambandi, at Føroyar longu hava ymisk feløg, sum kunnu stuðla undir hetta. Millum annað vísti hann á, hvussu virkin Føroya Oljuídnaðarbólkur (FOÍB) hevur verið í menningini av føroysku frálandsvinnuni, og at hesin felagsskapur hevur møguleika at menna seg enn meira til at gerast ein miðdepil í útbyggingini av tænastudeplinum. Samsvarandi spírar eru eisini til menningardepilin, segði Tróndur Djurhuus.





